**SEMJA**

**MILLUM**

**FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG**
**OG**
**STARVSFELAGIÐ**

Omanfyri nevndu partar eru í dag samdir um at leingja sáttmálan fyri Føroya Tele og Posta til 1. januar 2027.

1. Lønin í sáttmálanum fyri Føroya Tele hækkar í sáttmálaskeiðinum soleiðis:
   Hin 1. januar 2025 4,07 %
   Hin 1. januar 2026 3,87 %

2. Lønin í sáttmálanum fyri Posta hækkar í sáttmálaskeiðinum soleiðis:
   Hin 1. januar 2025 4,11 %
   Hin 1. januar 2026 3,87 %

3. Í grein 13, stk. 1 í sáttmálunum fyri Føroya Tele og Posta verður orðingin ", men ikki av serstøkum gjøldum" strikað.

   Eftirløn verður sostatt frameftir rindað av øllum lønargjaldinum sbrt. kollektiva sáttmálanum.

4. Í grein 23 í sáttmálanum fyri Posta og grein 25 í sáttmálanum fyri Føroya Tele verður vaktargjald I broytt til "15%" av lønarstig 18 fyri Posta og av lønarstig 17 fyri Føroya Tele og vaktargjald II broytt til "30%" av lønarstig 18 fyri Posta og av lønarstig 17 fyri Føroya Tele.

5. Í grein 32 í sáttmálanum fyri Posta og í grein 34 í sáttmálanum fyri Føroya Tele verður "*1. januar 2023*" broytt til "*1. januar 2025*" og "*1. januar 2025*" broytt til "*1. januar 2027*".

**Galdandi fyri Føroya Tele**

6. Í grein 21 um mattíð verður nýtt stk. 2 sett inn, sum sigur:

   "*Galdandi fyri telebúðirnar:*
   *Um starvsfólk eru til taks hjá arbeiðsgevaranum í steðginum, tí bert eitt starvsfólk er til arbeiðis, skal henda mattíð ikki dragast frá arbeiðstíðini.*"

**Galdandi fyri Posta**

Í sáttmálaskeiðinum eru partarnir samdir um at taka upp samráðingar um serreglur undir arbeiðssteðgi fyri tey øki, ið hava tilknýti til neyðtilbúgving.

**Tórshavn, 4. desember 2024**

**Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Kristoffur Laksá

Jórun Gardar

**Fyri Starvsfelagið**

Súni Selfoss/ Anna Johannesen

Birita F. Kjærbæk

**Fyri Føroya Tele**

Katrin á Mýrini Næss

**Fyri Posta**

Hildigerð Djurhuus